## EG MEINI TAÐ

# Apropos revsirættin



Bergur Rasmussen skrivar

*'Úr útlondum koma árin/ sum broyta lívsvirðini nógv!'* sjangrar tað støðugt í Útvarpi Føroya. Sangurin man vera populerur. Kanska lýsir sangurin føroysku fólkasálina: Vit búgva í Aldingarðinum, og eftir øllum at døma, so er hvørt hugskot, sum kemur uttaneftir spillandi ...

Tað var í hvussu er sagt, tá ið fólkini í sínari tíð rýmdu av gørðunum, fyri at skapa sær eina sjálvstøðuga tilveru. Tað var sagt, tá ið arbeiðsfólk og fiskimenn tóku seg saman í fakfeløg, fyri at tryggja sær mannsømilig kor. Tað var sagt, tá ið konufólkið kravdi at sleppa at ráa sær sjálvum og kroppi sínum, fyri at tryggja javnstøðuna millum kynini.

Og tað verður eisini sagt nú, ið uppskot er frammi um, at revsirætturin skal takast frá foreldrunum!

"Sosialistisk einsrættan!" "Uppalingin verður kriminaliserað!" "Skal tað nú ikki bera til at verja seg?" "Vit fáa eitt meldara-samfelag!" "Børn verða sett upp ímóti foreldrunum!" "Halgabók sigur, at man skal tukta tey man elskar!"

Og nú vit nevna bøkur, so kundi verið stuttligt í kjakinum um barnauppaling og revsirætt at víst til ta bók Jørgen Landt skrivaði um Føroyar í 1799. Landt skrivar soleiðis um føroysku skikkirnar á hesum øki: *Børne-Opdragelsen fortjener just ikke at roses; thi, formedelst Forældrenes lidt forvidt drevne Kjerlighed til deres Børn, opdrages disse til altformegen Egenraadighed; og man maae forundre sig over at Børnene ved denne efterladne og kjelne Opdragelse dog blive, naar de ere fremvoxne, til nogle ret flinke, raske ja endog maneerlige unge Mennesker.*

Tankavekjandi, ikki sannheit?

Hetta líkist tí, sum sagt er um gamla eskimoiska veiðusamfelagið uppi í Grønlandi. Har løgdu foreldrini heldur ongantíð hond á børnini. Óvitarnir skuldu jú vaksa til at hava fullkomið álit á sær sjálvum á mangan vandamiklu veiðuferðunum. - Kanska tað eisini lá aftanfyri fornu føroysku barnauppalingina, tí hvør torir at hava ein neurotikara við sær í bjørgini?

So um føroyingar einaferð í tíðini ikki kundu droymt um at sligið síni børn, skuldi tað ikki verið nakar trupulleiki at fáa hetta forboðið við lóg? Ella hvat? - Og at skjóta seg inn undir, at málið helst verður yvirtikið í nærmastu framtíð, sum onkur fólkafloksmaður gjørdi herfyri, er at renna undan ábyrgdini. - Málið snýr seg um at verja tey, sum ikki fáa vart seg sjálvan. - Eins og gjørt var, tá ið meistarin fekk forboð at sláa lærlingin. Ella tá ið maðurin fekk forboð at buka konu sína.

Jútskalóg staðfesti á sinni, at 'Við lóg skal land byggjast', og tað er upp til tey, sum byggja landið at tryggja at hetta verður gjørt! Óansæð tey útlendsku árin, vit hava tikið til okkum.

Kanska eru tað tey árin, sum áður umrøddi sangur sipar til, ið hava skapt eitt samfelag, har summi av sosialari og økonomiskari strongd missa tamarhaldið á sær sjálvum og brúka tykt í uppaling sínari. Vit upplivdu jú eina sanna kollvelting næst seinasta aldarskiftið: Sluppfiskiskapurin tók seg upp, fríhandilin varð settur á stovn, tjóðskaparkenslan vaknaði, fráhaldið kom og andaligu vekingarrørslurnar høvdu stórar dagar...

At vit nú standa á einum vegamóti við hesari mentanarligu barlastini og óttast, hvussu framtíðin fer at síggja út, eigur ikki at forða okkum at gera upp við hesa seinastu leivd av patriarkalska samfelagnum, at lýdni skal bukast inn í knokkin á børnunum. - Faðir situr ikki longur í hásæti og dømir millum livandi og deyð!

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820,
telefax 314720, teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro




Soleiðis speirak Sosialurin júst fýra ár fyri, at Sosialurin sjálvur flutti inn í »múrin« …

# Ruinin ið gjørdist tíðindadepil

Seinastu 21 árini hevur Sosialurin hildið til í tí, sum einaferð var ein ruin við Argjaveg 26 á Argjum. Her eru prentað umleið 22 milliónir eintøk av Sosialinum



Soleiðis sær »Argjamúrurin« út — nú Sosialurin hevur hildið til her í 21 ár

Mynd: Jens Kristian Vang

FYRI 25 ÁRUM SÍÐANI

*Eirikur Lindenskov*

» – Ikki bara kirkjubømenn, men eisini argjamenn hava ein múr«.

Soleiðis skrivaði Sosialurin í teiginum, Hornið, ið var at síggja á baksíðuni á Sosialinum í sjeyti- og áttatiárunum.

»Argjamúrurin«, ið sipað varð til, var múrurin, sum í eitt mannaminni stóð í gerð á Argjavegi 26.

Lagnunnar speisemi kunnu vit kanska siga tað vera, at blaðið júst fýra á seinni flutti inn í sama »múr« — ella ruin, ið tá varð sett í stand til blaðhús, prentsmiðju, matvøruhandil og bókavirki.

Tað var tann 5. mars í 1982, at Sosialurin flutti inn í nýinnrættaðu blaðhúsini á Argjum. Upprunaliga var tað Jákup hjá Carl á Lag, sum bygdi húsini, ið stóðu í gerð í nógv ár. Men tá Sosialurin keypti bygningin, var hann klæddur, tektur og vindeygu sett í.

Tað var ein kolvelting hjá blaðnum at flyta úr trongu Funningsstovu í Sjúrðargøtu 9 í Havn — og á fyrsta sinni at húsast í hølum, ið vórðu innrættað til endamálið.

Sosialurin kom um hetta mundið út tvær reisur um vikuna, men tá flutt varð út á Argjar, kom broyting í. Fyri tað fyrsta fekk blaðið aftur egna prentsmiðju, sum varð sett upp í kjallaranum. Fyri tað næsta var útgávudagatalið vaksið til tríggjar ferðir um vikuna, og so vórðu fleiri skrivandi fólk sett í starv.

Frá miðskeiðis í sjeytiárunum og fram til 6. mars í 1982, varð Sosialurin prentaður á rotatiónspressuni hjá Dimmalætting í Erling Jalsgøtu í Havn. Men við nýggju og framkomnu Goss pressuni, sum varð keypt úr Amerika, kundi Sosialurin prenta egna blað sítt eins og onnur bløð við.

Húsini á Argjum vóru stór — ja alt ov stór til Sosialin. Alt virksemi hjá blaðnum helt til á ovaru hæddini, meðan prentsmiðjan var í meginpartinum av kjallaranum. Á miðhæddini læt Smæran upp matvøruhandil, meðan Bókavirkið hjá Kára Olsen, seinni Vagni Olsen, sála, helt til í parti av miðhæddini og parti av kjallaranum.

Í dag verður einki blað prentað á Argjum. Sosialurin og Dimmalætting løgdu í juni 2000 prentsmiðjurnar saman í eitt felag, Prentmiðstøðin, sum í dag hevur einastu rotatiónsprentsmiðju í landinum, og er hon tí hin einasta, ið kann prenta bløð.

Tann fyrsta dagin, Sosialurin varð prentaður á Argjum, vórðu prentað 5.300 bløð. Ein vanligur leygadagssosialur í dag verður prentaður í umleið 8.000 eintøkum, og er blaðið seinastu 14 árini komið út fimm ferðir um vikuna. Eitt leysligt skot er, at umleið 22 milliónir eintøk av Sosialinum eru prentað á Argjum — og nógv, nógv teir flestu teirra hevur Jarleivur Hilduberg prentað, hann var prentari á Sosialinum frá byrjan í 1982 til hann legði frá sær vegna aldur í 1998.

Umframt blaðið hevur Sosialurin í dag fleiri aðrar tíðindakanalir, so sum InternetSosialin www.sosialurin.fo, www.olivant.fo og SkipsSosialin, ið er ein niðurpakkað teldufíla, ætlað føroyskum sjófólki. Í gomlu prentsmiðjuhølunum í kjallaranum er nú aftur eitt bókavirki — har húsast bókbindaríið hjá Hestprent.

Høvuðsredaktiónin hjá Sosialinum er framvegis á Argjavegi 26 á Argjum, men Sosialurin hevur eisini deildir í Klaksvík, í Sandvík, í Saltangará og í Vágum. Blaðið hevur eisini skrivstovu á Christiansborg í Keypmannahavn, og í Esbjerg situr Árni Joensen, sum dagliga skrivar útlendskt tilfar í Sosialinum.





*Hetta er almenna toylettið í býnum, Makuni Village, nær Livingstone, har kendu Victoria-fossarnir eru. Fólkið í Zambia er fátækt, og nógvir biddarar eru at síggja, fert tú har, sum vanligi afrikanarin ferðast*

*Mynd: Maria Hansen*



*Nógv verður gjørt fyri at upplýsa um AIDS og smittuvandan. Her framføra tey drama, nær við heilsumiðstøðina*

*Mynd: Maria Hansen*



*Hetta er heilsumiðstøðin í Makuni Village, har 8000 fólk búgva*

*Mynd: Maria Hansen*

# Á ferð í Zambia

Eitt, sum eyðkennir flestu fólk í Zambia, er, at tey eru serstakliga vinsæl. Men tey eru máttleys og hava einki áræði at vinna sær pening, ella at bøta um egnar liviumstøður. Orsøkin er, at har verður tikið sum givið at tjenar tú pening, hjálpir tú allari familjuni



*Maria í stovuni í hugnaliga heimi sínum í Vestmanna*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

FÓLK Á FERÐ

*Rúna Sivertsen*

Mariu Hansen kenna tey flestu frá hennara tíð sum bygdarráðsformaður og løgtingskvinna.

Maria er gift Jákupi Hansen, og eiga tey 3 døtur og ein son.

Í november í fjør fór hon saman við manni sínum til Zambia at vitja dótrina, sum í løtuni býr har saman við familju síni.

Zambia er eitt slætt og vakurt land, men har er lítið dyrkað, og nærum alt er oyðið. Ein rúgva av djórum liva har og alt gongur leyst, uttan leyvur og hýenur. Tó ganga djórini ikki millum húsini.

Fólkið er ógvuliga fátækt, lønirnar eru lágar og arbeiðsloysið stórt.

Størsti handilsmidepilin í høvuðstaðnum, Luzaka, har 1 milj. fólk búgva, er á støðd við SMS. Tó keypir vanligi afrikanarin ikki har, men á marknaðum. Har er eisini vanligt, at fólk býta um vørur sínamillum.

### Doyggja blaðung

Í Zambia doyggja nógv ung fólk av AIDS, miðal livialdurin er bert 39 ár. Í Luzaka er spildurnýtt hospis til ung foreldur, ið liggja at doyggja. Tað eru nunnur, ið standa fyri hesum hospis.

Tað verður gjørt nógv fyri at upplýsa fólk um smittuvandan, eitt nú við at framføra drama á fríøkjum.

Fólk í Zambia eru friðarlig, vinsæl og sera hjartalig. Har nýtist tær ikki at óttast harðskap, men tjóvar og biddarar eru sum flugur allastaðni. Tey, sum eiga pening, hava tað gott og liva væl í stórum húsum.

Tey hava húshjálp, sum gera alt arbeiði, bæði inni í húsinum og uttanum. Hjá teimum, ið eftir teirra málistokki eru vælhavandi, er neyðugt at hava høgar gyrðingar og portur uttanum húsini fyri at halda tjóvum burtur.

Fert tú har, sum fátæki zambiarin ferðast, er ikki ráðiligt at hava ur ella prýði uppi á sær, tí so verður ikki friður fyri biddarum.

### Stórt máttloysi

Tað er at undrast á, at fátækradømið er so stórt, tí landið er fruktagott. Men fólk eru máttleys og uttan áræði. Hóast tey fáa tilboð um jarðarstykki, sum tey sjálvi skulu eiga grøðina av, so taka tey ikki av.

Møguliga er orsøkin tann, at tey, sum royna at tjena pening, ongan kjans hava at savna nakað til sín sjálvs. Tey verða noydd fyrst at syrgja fyri familjuni, bæði systkjum og foreldrum.

Lønirnar hjá afrikanarum í Zambia eru ógvuliga lágar. Ein lækni tjenar ikki meiri enn 3000 og ein lærari um 700 krónur um mánaðin. Ein vællønt arbeiðsgenta fær bara 500 krónur í mánaðarløn. Orsakað av lágu lønunum, trívast tey, sum fáa sær útbúgvingar, ikki í landinum, men leita uttanlands at arbeiða.

Sjálvt um fátækradømið er stórt í Zambia, er samanhaldið í familjuni og umsorganin fyri hvørjum øðrum stór. Tað bæði sæst og hoyrist, hvussu góð tey eru við síni.

Maria hevur fyrr verið og vitjað í Suðurafrika og Chile, har døtur hennara eisini hava búð eitt skifti.

Hon sigur, at náttúran var nakað heilt serstakt í Zambia. At koyra ígjøgnum landið og síggja bygdirnar og strámátturnar á stóru víddunum, var heilt einastandandi. At vera áskoðari til náttúruna og djóralívið har, var sum at síggja ein stórfingnan film.

Maria er hugtikin av Zambia og sigur, at hon ikki er rættiliga heimafturkomin enn, so sterka ávirkan hevði landið og fólkið á hana. Fyri hana var túrurin ein einastandandi uppliving, sum hon avgjørt ætlar at endurtaka eina aðru ferð.



*Lítla Maria undir fremmandum himmalhválvi. Hon vil als ikki avmyndast og hevur drigið reyðprikkuta hattin langt niðurum nøsuna*